# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800




*Stóra ivamálið í ensku miðlunum er, um Cristiano Ronaldo verður tøkur hjá Manchester United í kvøld*
*Mynd: Polfoto/AP*

# Ronaldo verður helst tøkur

**Villareal og Manchester United spæla oddabrak í Champíons League í kvøld**

| Støðan í bólkaspælinum | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Bólkur A** | | | | | | | | | | | |
| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
| 1 | Chelsea | 4 | 2 | - | 1 | - | 1 | 6 | 3 | 3 | 7 |
| 2 | Roma | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 7 | 5 | 2 | 6 |
| 3 | Bordeaux | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 4 | 8 | -4 | 6 |
| 4 | CFR Cluj | 4 | 1 | - | 1 | - | 2 | 3 | 4 | -1 | 4 |
| **Bólkur B** | | | | | | | | | | | |
| 1 | Inter | 4 | 2 | - | 2 | - | 0 | 7 | 4 | 3 | 8 |
| 2 | Anorthosis F | 4 | 1 | - | 2 | - | 1 | 6 | 5 | 1 | 5 |
| 3 | Panathinaikos | 4 | 1 | - | 1 | - | 2 | 6 | 7 | -1 | 4 |
| 4 | Werder Bremen | 4 | 0 | - | 3 | - | 1 | 3 | 6 | -3 | 3 |
| **Bólkur C** | | | | | | | | | | | |
| 1 | Barcelona | 4 | 3 | - | 1 | - | 0 | 11 | 3 | 8 | 10 |
| 2 | Sporting L. | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 5 | 3 | 2 | 9 |
| 3 | Shakhtar D. | 4 | 1 | - | 0 | - | 3 | 3 | 5 | -2 | 3 |
| 4 | Basel | 4 | 0 | - | 1 | - | 3 | 2 | 10 | -8 | 1 |
| **Bólkur D** | | | | | | | | | | | |
| 1 | Atletico M. | 4 | 2 | - | 2 | - | 0 | 7 | 3 | 4 | 8 |
| 2 | Liverpool | 4 | 2 | - | 2 | - | 0 | 7 | 4 | 3 | 8 |
| 3 | Marseille | 4 | 1 | - | 0 | - | 3 | 5 | 6 | -1 | 3 |
| 4 | PSV Eindhoven | 4 | 1 | - | 0 | - | 3 | 3 | 9 | -6 | 3 |
| **Bólkur E** | | | | | | | | | | | |
| 1 | Manchester Utd | 4 | 2 | - | 2 | - | 0 | 7 | 1 | 6 | 8 |
| 2 | Villarreal | 4 | 2 | - | 2 | - | 0 | 9 | 5 | 4 | 8 |
| 3 | Celtic | 4 | 0 | - | 2 | - | 2 | 1 | 5 | -4 | 2 |
| 4 | AaB | 4 | 0 | - | 2 | - | 2 | 5 | 11 | -6 | 2 |
| **Bólkur F** | | | | | | | | | | | |
| 1 | Lyon | 4 | 2 | - | 2 | - | 0 | 10 | 6 | 4 | 8 |
| 2 | Bayern München | 4 | 2 | - | 2 | - | 0 | 6 | 2 | 4 | 8 |
| 3 | Fiorentina | 4 | 0 | - | 3 | - | 1 | 3 | 6 | -3 | 3 |
| 4 | Steaua B. | 4 | 0 | - | 1 | - | 3 | 3 | 8 | -5 | 1 |
| **Bólkur G** | | | | | | | | | | | |
| 1 | Arsenal | 4 | 2 | - | 2 | - | 0 | 10 | 3 | 7 | 8 |
| 2 | FC Porto | 4 | 2 | - | 2 | - | 0 | 5 | 7 | -2 | 8 |
| 3 | Dynamo Kiev | 4 | 1 | - | 2 | - | 1 | 3 | 3 | 0 | 5 |
| 4 | Fenerbache | 4 | 0 | - | 2 | - | 2 | 3 | 8 | -5 | 2 |
| **Bólkur H** | | | | | | | | | | | |
| 1 | Juventus | 4 | 3 | - | 1 | - | 0 | 7 | 3 | 4 | 10 |
| 2 | Real Madrid | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 5 | 5 | 0 | 6 |
| 3 | Zenit Petersborg | 4 | 1 | - | 1 | - | 2 | 4 | 4 | 0 | 4 |
| 4 | BATE Borisov | 4 | 0 | - | 2 | - | 2 | 3 | 7 | -4 | 2 |

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Aftaná dystin millum Aston Villa og Manchester United á Villa Park leygardagin, varð Manchester United venjarin, Alex Ferguson ógvuliga ivasamur, um Christiano Ronaldo fór at verða tøkur teir komandi dystirnar, tí tað sá einki út hjá portugisiska landsliðsspælaranum. Men tað vísir seg, at talan ikki er um ringan skaða. Ronaldo hevur vant við United-hópinum, og nógv talar fyri, at hann verður við í oddabrakinum millum Villareal og Manchester United í bólki E, sum verður spældur á Estadio el Magrigal leikvøllinum í kvøld kl. 19.45.

Darren Fletcher vandi eisini við hjá Manchester United í gjár. Hann hevur havt ein knæskaða. Dimitar Berbatov og Gary Neville eru ikki tøkir. Ivi er um Danny Welbeck.

## Dystirnir í kvøld

**Bólkur E**
Villarreal-Manchester Utd
AaB-Celtic

**Bólkur F**
Bayern München-Steua Bucharest
Fiorentina-Lyon

**Bólkur G**
Fenerbache-FC Porto
Arsenal-Dynamo Kiev

**Bólkur H**
Zenti St. Peterseburg-Juventus
BATE Borisov-Real Madrid

# Anton Skoradal skal hjálpa NSÍ




**Anton Skoradal, sum seinasta árið hevur staðið á odda fyri Víkingi, skal í 2009 hjálpa Paula Poulsen í Runavík**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

40 ára gamli Anton Skoradal verður í komandi kappingarári hjálparavenjari hjá NSÍ. Tað skrivar heimasíðan hjá runavíkingum.

Sáttmáli var sunnukvøldið skrivaður, sum bindir fyrrverandi Víkinga-venjaran at felagnum. Høvuðsvenjari í NSÍ er Pauli Poulsen.

Anton Skoradal var partur av GÍ-liðnum, sum fyrst í nítiárunum vann fyra meistaraheitið upp í slag.

# Bogi Løkin venur í Horsens

**Bogi Løkin er í hesu vikuni til royndarvenjing hjá AC Horsens**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Landsliðsleikarin Bogi Løkin er í hesum døgum til royndarvenjing hjá Superligufelagnum AC Horsens. 20 ára gamli miðvallarin hevur eina viku til at sannføra leiðsluna í felagnum.

Hóast sín unga aldur var Bogi Løkin kosin ársins stjørnuskot í føroyskum fótbólti í 2007. Fyrsta málið í landsliðsbúnanum kom eisini, tá hann legði Føroyar á odda ímóti Eysturríki á Tórsvølli í oktober.

# Síðsta freist at tekna til innandurakapping

Týsdagin 25. november er síðsta freist at tekna seg til innandurakapping í Vágshøll. Vinnandi lið fær gávukort, og besti leikari og málskjútti verða heiðrarir

Fótbóltskapping innandura fyri leikarar úr øllum Føroyum verður í Vági.

Innandurakappingin verður í Vágs høll 29-30 novembur.

Roynt verður nú at fáa tað stóru og vælumtóktu innandurakappingina á føtur aftur, og málbólkurin er leikarar úr øllum landinum.

5 leikarar kunnu spæla inni í senn. Tó ræður liðið sjálvt fyri talinum av leikarum.

Um kvøldið – aftan á kappingina - skipa fyrireikararnir fyri borðhaldi og dansi. Kostnaðurin fyri fótbóltskappingina er 150 kr fyri hvønn leikara. Borðhald og dansur er ikki íroknað hetta gjaldið.

Fyrireikarar vilja fegnir hjálpaleikarum norðaneftir at finna innivist í Suðuroynni.

-do